# Jacob Vestergaard fær nógv at hugsa um næstu dagarnar

**Tekur hann fiskiloyvið hjá Jógvan S aftur, væntar hann endurgjaldskrav. Men tekur hann ikki fiskiloyvið aftur, er vandi fyri at hann hann verður koyrdur frá sum landsstýrismaður**

HØVUÐBRýGGJ
*Áki Bertholdsen*

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum fær nógv at hugsa um teir næstu dagarnar.

Tað er málið um fiskiloyvið hjá Jógvan S, sum fer at geva honum nógv at hugsa um.

Tekur hann fiskiloyvið aftur, ivast hann ikki í, at landsskassin fær endurgjaldskrav frá reiðaranum.

Men tekur hann ikki fiskiloyvið aftur, er vandi fyri, at hann verður koyrdur frá sum landsstýrismaður.

Tað er hendan knípan, sum fer at volda landsstýrismanninum í fiskivinnumálum høvuðbrýggj teir komandu dagarnar.

Tá ið Jógvan S varð keyptur, fekk reiðarin tilsøgn um fiskiloyvi. Men síðani hevur Landsstýrismálanevndin viðgjørt málið og hennara niðurstøða er, at fiskiloyvið var ólógligt, tí tá ið fiskimálaráðið skuldi rokna veiðiorkuna út, brúkti tað skeivan roknihátt.

Veruleikin er, at Jógvan S hevur munandi størri veiðiorku enn bátarnir høvdu, sum eru farnir úr flotanum fyri hann.

Nakrar fáar dagar áðrenn Landsstýrismálanevndin var liðug at viðgera málið, útskrivaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum Jógvani S eitt fyribils fiskiloyvi.

## Viga fyri og ímóti

Men nú má hann hugsa seg gjølliga um, antin hann skal útskrivað bátinum eitt endaligt fiskiloyvi ella um hann skal taka fiskiloyvið aftur.

Jacob Vestergaard sigur, at hann er greiður yvir, at sama hvørja støðu hann tekur kann tað fáa avleiðingar.

Hann sigur, at hann hevur biðið umsitingina í Fiskimálaráðnum viga fyri og ímóti og at meta um, hvørjar avleiðingarnar kunnu vera av at taka fiskiloyvið aftur.

Í Sosialinum leygardagin segði Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, at tók Jacob Vestergaard ikki fiskiloyvið aftur, dugdi hann illa at ímynda sær, at hann framvegis var landsstýrismaður aftaná ólavsøku, skuldi samgongan vísa sama støðufesti í hesum føri, sum hon vísti, tá ið Helena Dam á Neystabø mátti frá og tá ið Jørgen Niclasen mátti frá.

Jacob Vestergaard er fullgreiður yvir vandan fyri, at misálit kann verða reist ímóti honum, tekur hann ikki fiskiloyvið aftur.

Tí er málið eisini politiskt heldur hann og møguliga fer hann at taka tað upp í samgonguni, áðrenn hann tekur støðu.

– Øðrumegin hava vit sostatt tær lógfrøðiligu avleiðingnarnar at taka fiskiloyvið aftur og hinumegin hava vit so tær politisku avleiðingarnar av at lata loyvið standa við. Alt hetta ksla vigast fyri og ímóti, áðrenn endalig støða verður tikin, sigur Jacob Vestergaard.


*Jacob Vestergaard er fullgreiður yvir, at tekur hann ikki fiskiloyvið hjá Jógvan S aftur, er vandi fyri, at hann verður koyrdur frá. Men enn er ongin avgerð tikin*

Annars vísir hann á, at eitt, sum kann gera tað trupult at taka fiskiloyvið hjá Jógvani S aftur, er, at sami rokniháttur er brúktur í fleiri øðrum førum.

– Skulu vit so eisini taka eini 30 onnur fiskiloyvi aftur, spyr hann?

Somuleiðis vísir hann á, at nú er roknihátturin broyttur, so at hereftir koma ikki fleiri mál av hesum slagnum fyri.

Annars heldur hann, at hetta er ein spurningur um lógfrøði, har løgfrøðingarnir í fiskimálaráðnum ikki eru samdir við løgfrøðingarnar hjá landsstýrismálanevndini.

Og tað er sjálvsagt ein spurningur um avgerðir frá landsstýrismálanevndini skulu fylgjast treytaleyst, hóast hann sjálvur hellir tann vegin, tí hann ásannar, at avgerðir í landsstýrismálanevndini eiga at viga nógv.

Men hví bíðaði tú ikki við at geva Jógvani S fyribils fiskiloyvi til landsstýrismálanevndin var liðug?

– Jógvan S fekk tilsøgn um fiskiloyvi fyri seinasta løgtingsval og tað er bindandi. Tað var eisini óvist, nær landsstýrismálanevndin fór at vera liðug. Og slapp Jógvan S ikki til fiskiskap, var eisini vandi fyri, at hann fór at krevja endurgjald fyri mista fiskitíð og sostatt mista inntøku, tá ið hann frammanundan hevði fingið bindandi tilsøgn um fiskiloyvi.

# Føroya Fiskavirking skal seljast ongantíð ov skjótt

**Javnaðarfólk eru ósamd um framtíðina hjá Føroya Fiskavirking. Dan Reinert Petersen sigur, at alt talar fyri at selja Fiskavirking beinanvegin og hann skilir ikki grundgevingarnar hjá formanni floksins, Jóannes Eidesgaard, sum ikki vil selja nú**

FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*

– Fiskavirking skal einskiljast sum skjótast tí tað er als onki, sum talar fyri at varðveita Fiskavirking á almennum hondum.

Dan Reinert Petersen í Fuglafirði er heitur talsmaður fyri at Framtaksgrunnurin selir Føroya Fiskavirking sum skjótast.

Dan Reinert Petersen sat nógv á tingi fyri javnaðarflokkin frá 1990 til 1994 sum varamaður fyri Jørgen Thomsen. Hann sat aftur á tingið frá 1998 til 2002 og nú er hann varamaður hjá Andreas Petersen.

Men hóast hann er frammaliga í flokkinum, dylir hann ikki fyri, at dregur ikki somu línu sum formaður floksins í einum av teimum stóru málunum, sum verða at taka støðu til í næstu: Framtíðina hjá Føroya Fiskavirking.

Jóannes Eidesgaard hevur fleiri ferðir gjørt greitt, at hann heldur tað vera skeivt at einskilja Fiskavirking enn. Eitt nú stúrir hann fyri, at útlendingar fara avstað við virkinum og aftur í blaðnum í dag hevur hann drúgva grein um, hví hann heldur at tað er skeivt at selja Fiskavirking.

– Men hesum grundgevingunum skilji eg ikki nógv av, sigur Dan Reinert Petersen.

Hann sigur, at fyri tað fyrsta stendur tað beinleiðis í viðtøkunum fyri Framtaksgrunnin, at hann skal selja vinnutólini beinanvegin tey eru sølubar.

– Virkar nevndin ikki fyri at selja Fiskavirking, brýtur hon sostatt sínar egnu viðtøkur.

Annars vísir hann á, at alla aðrastaðni verður tað hildið at vera ein stórur vinningur, at útlendingar gera íløgur í einum landi, ikki minst tá ið lítil vágafúsur pengar eru í landinum frammanundan, eins og tað vísa seg at vera í Føroyum í dag.

Hann minnir eisini á, at taðeru ikki meiri enn átta ár síðani at kreppan var uppá tað harðasta og tá sendi javnaðarsamongan ,sum tá sat, fleiri hundrað brøv út í øll møgulig lond í eini roynd at lokka útlendingar at gera íløgur í Føroyum.

– Tað verður allastaðni mett sum ein stórur fyrimunur fáa útlendskar íløgur, so grundgevingarnar ímóti útlendskum kapitali, skilji eg ikki.

Tá ið tosað verður um útlendskar íløgur, verður Pan Fish í Vági viðhvørt tikið fram sum eitt ræðandi dømi.

– Eg haldi, at hetta er eitt eindømi. Virkini hjá Fiskavirking fara ongan veg og ongin fer at keypa Fiskavirking fyri fullan prís, bara fyri at taka gamlar maskinur úr teimum.

Fuglfirðingurin heldur eisini, at tað er stórur munur á at fáa útlendskar íløgur í fiskivinnuna á landi og fiskivinnuni á sjónum.

– Missa vit ræðið á fiskivinnuni á sjónum, kunnu vit gerast rávøruútflytarar burturav og tað má ikki henda.

## Ongin fongur

Annars sigur Dan Reinert Petersen, at Fiskavirking er als ongin fongur hjá landskassanum.

– Fiskavirking hevur eitt yvirskot upp á 15-20 milliónir um árið og tað fer ikki ein króna av teimum í landskassan. Yvirskotið fer alt í Framtaksgrunnin.

– Tað undrar meg eisini, at formaður javnaðarflok-



*– Fiskavirking kastar ikki eitt oyra av sær til landskassan og tað skal seljast ongantíð ov skjótt, sigur Dan reinert Petersen,*

sins er so trekur at selja Fiskavirking, tá ið hann fyri bara einum ári síðani legði fram ítøkiligari ætlan fyri at einskilja Føroya Banka, tá ið hann ætlaði at hvør borgari í landinum skuldi fáa ókeypis partabrøv.

– Føroya Banka er ongin orsøk at einskilja. Hann hevur kastað hundraðtals milliónir av sær til landskassan. Hann hevur fingið tað skoðsmál, at hann er ímillum best riknu peningastovnar í ríkinum og tað eru óráð at pilka við eigaraviðurskiftini í eini slíkari fyritøku.

## Trýstir prísin

Sjálvur hevur Dan Reinert Petersen verið til skips hetta einasta árið.

– Og umborð á skipunum er tað ein greið niðurstøða, at Fiskavirking hevur so stóran part av virkjunum, at teir trýsta prísin niður. Fiskavirking keypir næstan 40% av fiskinum og ein so stórur, einstakur keypari ásetur í veruleikanum, meiri ella minni, prísin sjálvur, tí virkini hjá Fiskavirking bjóða ikki ímóti hvørjum øðrum.

– Hóast vit missa fimm fiskidagar, loysir tað seg hjá okkum at sigla uttanlands at selja, so lágir eru prísirnir í Føroyum, sigur hann.

– Tí er tað ein greið fatan ímillum fiskimenn, at kappingin er ov lítil. Verða virkini í Fiskavirking seld, hevði kappingin verið størri og so fóru prísirnir upp.

Tó ásannar hann, at verður Fiskavirking í einum og framhaldandi rikið sum eitt virkið, fer kappingarstøðan neyvan at broytast.

– Mítt útgangsstøðið er, at Fiskavirking skal liðast sundur og seljast í smáum, tí tað er tað besta fyri fiskimannin, sigur Dan Reinert Petersen.



# Durita vann á Kambsdali

**Durita Mohr Jacobsen vann fimta undanumfarið í Nósabarnaprix 2003, sum var í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*

Nósabarnaprixtiltakið á Kambsdali leygarkvøldið var væl eydnað. Fyrireikararnir høvdu gjørt sær ómak, so at øll, bæði børn og vaksin, skuldu fáa eitt hugnaligt og stuttligt kvøld.

Angela, Baby-James og Hannibal undirhildu við sangi og skemti.

Vinnari gjørdist Durita Mohr Jacobsen av Kambsdali við sanginum, "Vit eru glað". Nummar tvey gjørdist Ansa Højgaard úr Søldarfirði, og nummar trý varð Hjørdis Nesá av Toftum.

Nú er bert eitt undanumfar í Nósabarnaprix eftir; tað verður í bygdahúsinum í Miðvági tann 12. juli. Finalan verður í Badmintonhøllini í Havn tann 28. juli.

Tað er Føroya Banki, ið stuðlar Nósabarnaprix 2003.


*Durita (t.v.) fór avstað við sigrinum. Ansa Højgaard úr Søldarfirði (í miðjuni) gjørdist nummar tvey, og Hjørdis Nesá av Toftum fekk triðja plássið*


*Durita Mohr Jacobsen av Kamsdali sleppur víðari í finaluna, sum verður í Badmintonhøllini í Havn tann 28. juli*

# Spæl úr sorgarleiki

**Bert hugflogið setir mørkini, verður sagt. At mørk skulu vera, eru helst tey flestu samd um. Men, hvar mørkini ganga, er kanska ikki altíð so lætt at vita**

ÁLVARA OG GAMAN
*Rúna Sivertsen*

Tó, tað mundi fella flestu varmakeldugestum og fuglfirðingum við fyri bróstið, at ein av hoppiborgunum ímyndaði Titanic á veg í havsins djúp.

Sorgarleikurin, tá Titanic sakk fyri meiri enn níti árum síðani, skakaði heimin tá, og ger tað enn tann dag í dag.

Hetta stolta ferðamannaskip varð bygd á ein slíkan hátt, at tað ikki skuldi kunna søkka. Men náttúran var sterkari enn mannahondin, og ein av størstu sorgarleikum, heimurnin hevur kent, kravdi meiri enn 1500 mannalív.

Um henda góða hoppiborg er ósømilig ella ikki, lata vit upp til lesaran at meta um. Í hvussu er og ikki, hildu fólk á vegnum hetta vera "langt úti", sum onkur tólk til.

Fyrireikararnir harmast og siga, at søkkandi skip ikki verða nýtt til skemtunar eina aðru ferð.



*Fólk argaðust um eina av hoppiborgunum á varmakeldustevnu, sum ímyndaði Titanic á veg í havsins djúp*
*Mynd: Rúna Sivertsen*